# Innangarðsútskifting

# í

# Hvannasundi



**Góðveðurskvøldi 28. juni 2023 varð útskiftingarfundur settur í kommunuskrivstovuni í Hvannasundi at viðgera mál um innangarðsútskifting.**

Umframt nevndina Olaf í Garði Joensen, Mariu Gregersen og Arnold Thomassen, møttu borgarstjórin Katrin Næs, Tóri Simonsen, Andreas Nýggjagarð, Innistovufesti, Niels í Buð, Heðin í Frammistovu, Frammistovufesti, Andras í Frammistovu, Britustovufesti og Joen Jacob Sirdal, Uppistovufesti.



Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna.

Tá klokkan var farin av 19 beyð formaðurin fundarfólkinum vælkomnum.

Fram varð lagt:

Skjal nr. 1: Lýsing frá 28. mars 2023 sum hevur staðið í svørtutalvu og á heimasíðunum hjá Hvannasunds kommunu, Umhvørvisstovuni og Norðlýsinum.



Uppá fyrispurning, um nakar hevði viðmerkingar til lýsingarháttin, svaraði ongin.

Formaðurin lýsti fundin lógliga lýstan og settan.

Skjal nr. 2: Grannastevnuviðtøkan frá 28. mars 2014 við tilhoyrandi skjølum og góðkend av Búnaðarstovuni 10. mars 2022.

Skjal nr. 3: Skriv frá Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum dagfest 14. desember 2022, har Arnold Thomassen er tilnevndur til útskiftingarformann.

Skjal nr. 4: Útskrift úr rættarbókini 13. januar 2023, har Tróndur Niclassen, bóndi í Bø og Eyðstein Joensen, bóndi á Sandi verða uppnevndir til nevndarlimir.

Av persónligum áðum hava báðir boði seg undan av at taka at.

Næstu á listanum eru Olaf í Garði Joensen, 470 Eiði, og Maria Gregersen, við Matará, 513 Syðrugøtu. Heitt hevur verið á tey um tey kunnu átaka sær at vera nevndarlimir. Eftir at hava kannað eigaralistan og mettu seg ikki vera gegni, og játtaðu at taka av at vera nevndarlimir.

Greitt varð frá § 10, har útskiftingarkravið kann takast aftur, um øll, sum atkvøddu fyri útskiftingini á grannastevnu, ynskja hetta.

Formaðurin spurdi, um fundarfólkið ynskti at taka málið aftur. Eins og á grannastevnuni varð semja um, at útskiftingin skuldi fremjast, og málið varð ikki tikið aftur.

Habiliteturin varð viðgjørdur. Nevndarlimirnir vita seg ikki vera so nær skyldar ella svágdar við nakran ognara í Hvannasundi, at tað nemur teirra habilitet.

Eingin hevði viðmerking til habilitetin, og er nevndin skipað soleiðis:

Arnold Thomassen, formaður
Olaf í Garði Joensen, nevndarlimur
Maria Gregersen, nevndarlimur

Nevndarlimirnir hava áður skrivaðu undir hesa váttan:

*"At eg vil leggja mær eina við og óheftur útinna tær skyldur, sum liggja á mær sum útskiftingarnevnarlimi, tað vátti eg við hond míni undir trúnaðartreytum."*

Nevndin hevur kannað eigindómsviðurskiftini.

Matrikuleringin av Hvannasundi byrjaði 11. mai 1978 og varð endað 25. august 1983. Tá vóru 124 eigindómar skrásettir.

Innangarðsvíddin í Hvannasundi er uml. 34.8 ha., og herav eru uml. 16,6 ha. sum hoyrir til kongs.

Í dag eru 167 eigindómar í Hvannasundi við íalt 254 lutum. Tað eru 21 felagseigindómar.

Nevndin metir, at sambært § 2 í útskiftingarlógini er grundarlag fyri útskifting og ásett verður at:

**Útskifting innangarðs í Hvannasundi verður at fremja.**

Nevndin skal samb. Útskiftingarlógini §33 taka støðu til garðahald.



Hvannasund er vetrarfriða. Tá var avtala gjørd millum festarar og kommununa um garðahald. Ynskt verður, at garðahaldi verður óbroytt. Nevndin skal fáa avtaluna millum festararnar og kommuna sendandi.

Eitt sindur av práti var um vetrarfriðing og avlýsing av vetrarbiti. Tosað var um eitt líknandi mál í Vestmanna, og tí hevði kommunan haft sakførara at ráðgeva seg um hetta mál.

Greitt var frá, at matrikulin og matrikulkortið verða grundarlagið undir útskiftingini, og tí er týdningarmikið at eigararnir kanna, um nakar feilur er í matrikli og matrikulkorti. So var skjal nr. 5 lagt fram, og víst var á at matrikulkorti sæst á kortal.fo.

<u>Skjal nr. 5</u>: Eigaralistar fyri Hvannasund.

Formaðurin greiddi frá, hvussu skiftið fer fram, og hvør eigaranna lutur í skiftinum er.

Greitt varð frá, hvussu umráðandi tað er, at góðskumetingin er røtt. Áðrenn nevndin kann fara at meta vera eigara og festarar bidnir um at hjálpa nevndini at býta bygdina upp í øki og áseta góðskuna fyri tey ymisku økini.

Fundarfólki setti so á kort hvar besti bøurin var. Mett var at norðanfyri og sunnanfyri umrødda øki var góðskan umleið tann sama.



Fyri at grundarlagi at býta skal vera so gott sum gjørligt er neyðugt at mála upp. Onkustaðni er fjøran nógv broytt, aðrastaðni eru bøgarðarnir ikki so neyvt teknaðir inn og tað kann vera at marki millum ognirnar ikki er rætt, og nakað fari undir veg.

Kommunan hevur møguleika at ognartaka eftir útskiftingarlógini §22. Har er ásett at ognartakast kann 2 % av veltum bøi og 4 % av óveltum bøi. So her er ein møguleiki at ognartaka tað, sum er fari undir veg.

Greitt varð frá hvussu fram verður farið – góðskumeta, uppmálast og gera metkortini. Tá hetta arbeiði er gjørt verður kallað inn til nýggjan fund har góðskumetingin verður løgd fram.

Kort og eigaralistar liggja frammi á kommunuskrivstovuni, og skjølini eru eisini tøk á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni: www.us.fo.

Formaðurin takkaði fyri ein góðan fund.

Fundurin var lokin kl. uml. kl. 20:30.

**Olaf í Garði Joensen** **Maria Gregersen** **Arnold Thomassen, fm.**

**Góðskumeting av bønum**



Í besta veðri 25. juni 2024 varð farið undir at meta bøin í Hvannasundi.

Umframt nevndina var Jógvan R. Frýdal frá Umhvørvisstovuni við.

Byrjað varð við at hyggja eftir økinum, har hvannasundsmenn mettu var besti bøurin, og síðan varð farið eftir vegnum fyri at fáa eina mynd av restini av bønum. Eftir tað metti nevndin seg hava eina heildarmynd av bønum.

Síðan var lagt til brots við at seta metið á kort.

Byrjað varð í besta bønum og hildið varð áfram suður gjøgnum bøin. Tá dagurin var liðin, var komið suður móti Bólsteini.

Góðveðrið helt fram 26. juni, og tá varð norðari partur av bønum mettur. Byrjað varð á sama staði sum dagin fyri, og gingið varð norð gjøgnum bøin. Tá farið var um nón, var bøurin í Hvannasundi gingin, og met var komið í allar lutirnar.

Tað skerst ikki burt, at ivamál stinga seg upp undir metingini. Tað, sum hevur verið velt, kann vera fallið aftur í forna, og onnur ivamál kunnu eisini koma fram, tá metið verður skrásett í telduni. Áðrenn farið var hvør til sítt varð avtalað, at um nakað met var ivasamt, kundi tað avgreiðast umvegis teldupost.







**Uppmáling**

Fyri at fáa best møguligt grundarlag at fremja útskiftingina eftir, krevst at nógv skal málast upp.

Ung fólk, sum hava verið hjálparfólk á matrikuldeildini, hava verið í Hvannasundi og mált upp. Serliga eru tað garðar, vegir og bakkin, sum eru máld upp.

Uppmálingin er grundarlag fyri, at víddin verður so røtt sum møguligt. Eisini skal uppmálingin brúkast til, um nakað skal rættast í samband við útskiftingina.

**Metingin teldutøk**

Eftir at bøurin var mettur, og útryðjurnar vóru máldar, varð metið lagt á talgilt kort.

Tá arbeitt var at seta metið á kortið, stakk okkurt ivamál seg upp. Ivamálini vóru greidd umvegis teldupost og sett á kort.

**Fundur um metið.**

Nevndarfundur var hildin á Umhvørvisstovuni  28. november 2024. Kl. 10.

Nevndi møtti fullmannað og Jógvan R. Frýdal og Brian Hansen umboðaðu Umhvørvisstovuna.

Gerðabókin var lisin.

Góðskumetingin var gjøgnumgingin.

Nevndin var samd um, at góðskumetingin var gjørd út frá bestu sannføring, og at leggja góðskumetingina fram á fundi í Hvannasundi.

Fundurin varð slitin kl. 11.30.

**Útskiftingarfundur í Hvannasundi.**

Góðveðurskvøldið 3. juli 2025 kl. 19. var útskiftingarfundur settur á kommunuskrivstovuni í Hvannasundi.



Eittans mál var á skrá. Framløga av góðskumetingini.

Nevndin møtti fullmannað.

Jógvan R. Frýdal og Brian Hansen umboðaðu Umhvørvisstovuna.

Hvannasundsmenn sum møttir vóru: Leivur í Buð, Joen Jacob Sirdal, Tóri Simonsen, Karl Vilhelm Hansen, Andreas Nýggjagarð, Heðin í Frammistovu og Andrass í Frammistovu.

Gerðabókin varð lisin.

Greitt varð síðan frá góðskumetingini, og hvussu nevndin fór til verka fyri at meta um bøin í Hvannasundi.



Áðrenn góðskumetingin varð løgd á borðið varð í stuttum greitt frá næsta stigi í útskiftingini.

Góðskumetingin er grundarlagið undir útskiftingini, og tí er alneyðugt, at eigararnir gjølla kanna metið, og um nakað er ivasamt ella skeivt, skal hetta boðast frá til nevndina innan 20. juli 2025.

Móttiknar viðmerkingar verða gjøgnumgingnar av nevndini, og síðan verður góðskumetingin latin til kæru. Kærufreistin er tríggjar mánaðir.

Meðan góðskumetingin liggur til kæru er annað, sum skal greiðast.

Í útskiftingarlógini hevur tað almenna møguleika at ognartaka 2 % og veltum og 4 % av óveltum.



Hvannasunds kommuna og Landsverk hava møguleikan at ognartaka burtur av óbýttum. Meðan góðskumetingin liggur til kæru, verður tosað við Landsverk og Hvannasunds kommunu um tey ætla at ognartaka í samband við útskiftingina.

Spurningur varð reistur, um møguligt var at leggja nakrar fermetrar aftur at einum grundstykki.

Um so er, at ein eigur annað stykki í bygdini, er tað ein møguleiki, men Hvannasund er kongsbygd, og nærum allur bøurin er kongs, so her er ein avmarking. Um tað er møguligt hjá eigarum at keypa nakrar fermetrar aftur at av óbýttum, og leggja teir aftur at sínum grundstykki, skal kannast nærri.

Síðan var góðskumetingin løgd á borðið, so eigarar og festarar betur kundu síggja metið.

Meðan menn hugdu eftir metinum, gekk prátið lystiliga.

Onkustaðni var hildið, at ikki rætt var mett. Heitt varð á fundarfólkið at senda viðmerkingar fyri at betra um góðskumetingina og harvið grundarlagið undir útskiftingini.

Samstundis var heitt á eigararnar at koma við ynski um, hvar teir ynskja at liggja í framtíðini. Best er, um festarar og eigarar kunnu seta seg saman og koma við einum felags ynski. Ynski skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 1. oktober 2025.

Tá klokkan var farin av 20:30 takkaði formaðurin fyri ein góðan og skemtiligan fund og sleit fundin.

**Olaf í Garði Joensen** **Maria Gregersen** **Arnold Thomassen, fm.**

**Viðmerkingar til góðskumetingina**

Á seinasta fundi var heitt á eigarar og festarar um gjølla at kanna góðskumetingina og koma við viðmerkingum, um hildið var, at okkurt var skeivt mett.

Nevndin fekk eina viðmerking. Traðareigararnir av matr.nr. 4 hildu, at økið á trøðni var ov lágt sett.

Tvinnir møguleikar eru. Annaðhvørt at meta av nýggjum við grund í minni og myndum, ella fara aftur á staðið fyri at kanna metið.

Avrátt var at fara aftur á staðið 17. september 2025 at endurmeta trøðna.

**Ástaðarfundur í Hvannasundi 17. sept. 2025 kl. 15.30**

Nevndin møtti fullmannað, og Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna.

Leivur í Buð umboðaði matr.nr. 4.

Nevndin hevði lisið innkomna skriv, og hegnisliga greiddi Leivur frá teirra sjónarmiðum um metið og um útskiftingina sum heild. Eisini vísti hann á tey øki, sum teir hildu mett var í lægra lagi.

Tá Leivur var liðugur at greiða frá, fór hann aftur til hús.

Síðan var støða tikin til, um metið skuldi broytast ella ei.

Tá tosað var saman eina stund, var semja um, at onkustaðni kundi metið hækkast og aðrastaðni varð hildið fast í upprunametinum.

Vát og køld var farið hvør til síns, tá klokkan nærkaðist 17.



**Góðskumetingin latin til kæru**

Eftir ástaðarfundin í Hvannasundi eru kort og eigaralistin við meti rættað samsvarandi.

Nevndin letur tí nú góðskumetingarkort og eigaralista við meti til kæru.

Møgulig kæra skal vera skrivlig og stílast til

**Yvirútskiftingarnevndin**

C. Pløyensgøta 1

Postboks 28

110 Tórshavn.

Kærur skulu vera Yvirútskiftingarnevndini í hendi í seinasta lagi **22. desember 2025**.

**Olaf í Garði Joensen** **Maria Gregersen** **Arnold Thomassen, fm.**